

*Hóast ferðin var stór, stuttleikaðu tey sær handan leiktjøldini undir seinastu sýningini hóskvøldið. Her styrkir Høgni Reistrup seg við einum kaffimunni, meðan dansararnir í bakgrundini bíða eftir næstu uppgávuni*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Stuttleiki, ferð og sorgblídni

**Millum alskyns klædnabúnar, leidningar, spegl, stólar og smyrslborð var ferðin eins stór handan leiktjøldini sum á palli, tá Sosialurin hóskvøldið var "backstage" undir seinastu sýning av sangleikinum "Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið". Tó merktist, at talan loksins var um seinastu sýning**

JÓSEF
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Tá komið var inn í fyrireikingarrúmini handan pallin hjá manningini í sangleikinum um Jósef skuldu vit ikki trúð, at enn ein stór og krevjandi framførsla fór av bakkastokki um fáar minuttir. Leikarar, sangarar, kór, tónleikarar, dansarar og fyrireikarar tyktust als ikki vera merkt av nervum, hóast 400 spentir áskoðarar, sum við bit og slit høvdu fingið hendur á seinastu atgongumerkjunum, bíðaðu hinumegin. Avslappandi og róligi stemningurin hevur kanska sína frágreiðing, tí hóskvøldið var nevniliga seytjanda ferðin, at ungu leikararnir framførdu stóra sangleikin. Eg fekk at vita, at stemningurin hevði verið nakað spentari, hevði eg vitjað fáar minuttir undan aðalroyndini…

## Ferðmikið

Men so fór niðurteljingin veruliga í gongd, og millum alskyns klædnabúnar, leidningar, spegl, stólar, borð og smyrsl kom knappliga lív í kaotiska rúmið. Jósef trein loksins á pall fyri seinastu ferð, og brádliga runnu dansarar og leikarar aftur og fram við fullari ferð av og á pallin. Skundurin millum senurnar var øgiligur, tá smyrsl og búnar skuldu skiftast út, og ikki var gott at vera fyri, tá leikarar høvdu fá sekund at gera seg til reiðar til næsta brot í leikinum.

Tað tyktist tó heldur vera "system i rodet" enn "rod i systemet" backstage hetta hóskvøldið, tí tað gekk sera skjótt hjá ferðmiklu og strongdu leikarunum at tilbúgva seg til næsta brot á glamourøsa pallinum. Tað merktist tó, at vit vóru til staðar undir sjálvari seinastu sýningini, tí álvarsemi og traditionellur seriøsitetur vóru ikki í hásæti. Við jøvnum millumbilum rungaði láturin handan leiktjøldini, og fólk fnisaðu, tvætlaðu, flentu og prátaðu í smáu steðgunum um alt annað enn sjálvan leikin. Jú, týðiligt var, at hvør rørsla, hvør gerð og hvør regla eftirhondini var so vand, at eingin orsøk var til nervar, og uttan nakra hjálp frá leiðarunum dugdu leikararnir alla mannagongdina uttanat.

## Potifar fekk karm

Sum vant er seinasta sýning eitt sindur øðrvísi, har leikarar ikki taka tað heila so tungt. Hóskvøldið var einki undantak, og til stuttleika fyri fleiri hevði onkur t.d. lagt eina vatnballón á stólin hjá sjálvum Potifar, sum gjørdist rennvátur, tá hann frammanfyri 400 fólkum á palli setti seg í stól sín, tó uttan at áskoðarar varnaðust.

Annars hoyrdist handan pallin, at smyrsl og búnar vórðu roynd á ein øðrvísi og meiri skemtiligan hátt undir endabrestinum, og leikararnir skemtaðu sær við ymsu eksperimentunum. Tó hevði onkur fyrireikari í øllum rokinum á lofti, at nú skuldu øll líka minnast, at fólk eisini høvdu goldið fyri hesa seinastu eykasýningina, og at framførslan á ongan hátt mátti gerast óseriøs. Sum skilst tyktist seinasta framførslan tó vera eins fullfíggjað og tær, sum seinastu tvær vikurnar hava fingið føroyingar í felag at undrast og og gleðast um stórsligna tiltakið.

So var steðgur hjá áskoðarum, men handan leiktjøldini var alt annað enn steðgur. Í relativt tronga rúminum tysjaðu ymsu leikararnir aftur og fram ímillum hvønn annan og leitaðu eftir tí, tey skuldu nýta. Onkur minti á, at seinasti steðgurin var komin, og í fyrireikingunum til seinnu hálvu góvu fleiri til kennar, at nú gleddu tey seg bert til endan.

## Aftur gerandisdagur

Seinna helvt gekk eins ferðmikil og fyrra, har fólk runnu upp og niður og aftur og fram í støðugari kapping við avmarkaðu tíðina. Undir longru steðgunum hjá summum av leikarunum góvu tey sær tó góðar stundir at práta og flenna uttan at hugsa um tað, sum fór fram á palli. Men so var brádliga boð eftir teimum, og leiðin gekk aftur á pallin.

Sorgblíða og forloysandi løtan var loksins komin, tá leikarar, kór, dansarar og tónleikarar loksins trinu av upplýsta pallinum fyri seinastu ferð, og fyri eini standandi, klappandi og týðiligt nøgdari fjøld var endin komin á eini stórtíð fyri manningina í sangleikinum og fyri føroya fólk.

Eftir leikin var lagið í topp, og fólk hálsfevndust og takkaðu hvørjum øðrum fyri minningarríkt samstarv. Frá einum gerandisdegi á stórslignum palli í Norðurlandahúsinum fór yvirgongdin nú fram til "vanliga", gráa gerandisdagin, og tískil var talan eisini um sorgblídni, nú sterka eindin handan leikin fór í upploysn og allir einstaklingarnir aftur skuldu hvør til sítt.



Herleif Hammer, framleiðslustjóri:

# Jósef sló øll met

**- Tilsamans hava 6450 áskoðarar verið til sangleikin, og atgongumerkjasølan til Jósef hevur ongantíð gingið so skjótt áður, sigur Herleif Hammer, framleiðslustjóri í sangleikinum**

JÓSEF
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Herleif Hammer hevur seinastu mánaðirnar verið ein av høvuðsmonnunum handan stóru verkætlanina "Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið". Sum framleiðslustjóri hevur hann havt úr at gera, og Herleif ásannaði eisini, at tað hevur verið strævið, tá vit hittu hann backstage undir seinastu framførsluni hóskvøldið.

- Vit hava nýtt tímar hvønn dag í Norðurlandahúsinum í nakrar mánaðir, og á tann hátt er tað gott, at alt nú er liðugt, segði ein troyttur men nøgdur Herleif Hammer. Umframt allar venjingarnar hevur hann saman við hinum fyrireikarunum staðið fyri tilsamans 17 sýningum í Norðurlandahúsinum.

## Frá smørtenori til rokkara

Herleif Hammer greiðir frá, at Norðurlandahúsið ongantíð áður hevur selt so nógv atgongumerki so stutta tíð.

- Tá vit lýstu við eykasýningum, var bíðirøð langt út í tún í Norðurlandahúsinum, og 764 atgongumerki vórðu seld innan fýra tímar, sigur framleiðslustjórin. Hóskvøldið varð so endabresturin hjá teimum yvir 100 fólkunum handan sangleikin, sum hava arbeitt og vant síðani desember.

- Tað er ikki frítt, at røddin hjá fleiri av sangarunum treingir til hvíld og er slitin nakað gjøgnum krevjandi framførslurnar. At byrja við ljóðaði t.d. Jósef (Jóannes Lamhauge) sum ein smørtenorur, men nú er hann ein reinur rokkari, heldur Herleif skemtandi fyri.

## Eingin útgáva

Framleiðslustjórin handan Jósef og hansara dreymakot sigur, at føroyingar ikki skulu vænta nakra tónleikaútgávu av sangleikinum eins og talan var um eftir Skeyk sangleikin á sinni.

- Upphavsrætturin hjá Andrew Lloyd Webber ger tað alt ov kostnaðarmikið hjá okkum at geva tónleikin út, tí føroyski marknaðurin er einfalt ov lítil, sigur Herleif Hammer, sum nú loksins sleppur at hvíla seg, áðrenn farið verður undir okkurt annað…



*- Tá vit lýstu við eykasýningum, var bíðirøð langt út í tún í Norðurlandahúsinum, og 764 atgongumerki vórðu seld innan fýra tímar, sigur framleiðslustjórin Herleif Hammer, sum her er avmyndaður handan leiktjøldini undir endabrestinum hóskvøldið*

*Mynd. Finnur Justinussen*

Erla og Ann Chanett, frásøgufólk:

# Sangirnir gerast ikki keðiligir

**- Tað ljóðar møguliga løgið eftir 17 sýningar og nógva venjing, men vit eru ikki troyttar av sangunum, vit aftur og aftur hava sungið, søgdu tær báðar Erla Bech Jensen og Ann Chanett Danielsen eftir seinastu sýning hóskvøldið**

JÓSEF
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Tað hevur verið stuttligt, strævið og avbjóðandi, og nú eftir seinastu sýning er tað bæði syrgiligt og gott, staðfestir Erla Bech Jensen, sum her er avmyndað hóskvøldið á veg inn á pallin at syngja*

*Mynd: Finnur Justinussen*



*– Eg stúri fyri, hvat eg nú skal gera, segði ein glað og rørd Ann Chanett Danielsen hóskvøldið fáar minuttir eftir, at hon trein av palli fyri seinastu ferð*

*Mynd: Finnur Justinussen*

- Eg stúri fyri, hvat eg nú skal gera, sigur ein glað og rørd Ann Chanett Danielsen fáar minuttir eftir, at hon fyri seinastu ferð er komin av palli á hesum sinni. Tær báðar Ann Chanett og Erla Bech Jensen hava seinastu tvær vikurnar sungið søgugongdina í sangleikinum fyri áskoðarum og áhoyrarum, og saman við Jóannes Lamhauge (Jósef) hava tær verið sjónligastu einstaklingarnir í leikinum. Men eftir endabrestin hóskvøldið høvdu tær als ikki mist hugin.

- Satt at siga eru vit ikki troyttar av sangunum, vit í mánaðir nú hava vant, sigur Erla Bech Jensen, meðan Ann Chanett nikkar samtykkjandi. Tær upplýsa, at tær hava vant sera nógv í tveir mánaðir, men nú er alt brádliga liðugt fyri yndisligu sangfuglarnar.

- Hetta hevur verið ein uppliving, eg ongantíð fari at gloyma, og eg fari eisini at sakna øll tey nýggju fólkini, eg eri komin at kenna, sigur Ann Chanett Danielsen.

## Stríðið vert

Erla Bech Jensen vísir á, at øll tíðin undir venjingum og fyrireikingum hevur verið alt stríðið vert.

- Tað hevur verið stuttligt, strævið og avbjóðandi, og nú eftir seinastu sýning er tað bæði syrgiligt og gott, staðfestir Erla, áðrenn hon leggur afturat, at tað av sonnum hevur verið ótrúliga litfagurt at luttikið í sangleikinum"Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið".

Tær báðar leggja tó afturat, at uttan sersømdir frá skúla og arbeiðsplássi høvdu tær møguliga ikki fullført krevjandi uppgávuna sum frásøgufólk og harvið sum høvuðspersónarnir í stóra leikinum.

Jóannes Lamhauge:

# Skúlin hevur verið forsømdur

**- Hetta hevur verið eitt ótrúliga mennandi tíðarskeið fyri meg bæði sálarliga og sosialt, har mørk eru flutt í mínum lívið, segði ein bæði glaður og syrgin Jóannes Lamhauge, sum hevur havt høvuðsleiklutin sum Jósef. Hann ásannar tó, at nógva orkan hevur gingið út yvir skúlagongdina**

JÓSEF
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Jóannes Lamhauge hevur seinastu tvær vikurnar bergtikið føroyingar við høvuðsleiklutinum sum Jósef, og tá vit fingu orðið á hann eftir seinastu sýning hóskvøldið, vóru kenslur hansara blandaðar.

- Tað er gott, at alt er liðugt, og at man nú kann koma víðari, men samstundis ræður í hesi løtu ein sorgblíður stemningur, sigur Jóannes Lamhauge, beint sum hann er komin av pallinum fyri seinastu ferð og verður hálsfevndur frá høgru og vinstru.

## Sosial og sálarlig menning

Jóannes Lamhauge sigur, at skúlin meiri ella minni hevur verið við sviðusoð hesa tíðina, Jósef og dreymakotið hava kravt hansara tíð, men harafturímóti hevur hann fingið so nógv annað týdningarmikið.

- Eg havi ígjøgnum verkætlanina verið fyri eini sosialari og sálarligari menning, so tað gerst ikki við, at tað hevur gingið út yvir skúlan, tá eg eri vorðin eitt so nógv ríkari menniskja, sigur Jóannes Lamhauge.

Jósef, sum vit betri kenna hann, hevði als ikki væntað, at hann skuldi fáa leiklutin, og hevur hann als ikki royndirnar til slík stór tiltøk.

- Vit hava sungið á onkrari café og okkurt líknandi, men eg havi ongantíð áður roynt nakað so stórt, heldur høvuðsleikarin at enda. Nú skal hann so aftur liva ein gerandisdag sum Jóannes Lamhauge og ikki sum Jósef, hóast teir báðir nú møguliga hava okkurt til felags.



*– Hetta hevur verið ein sosial og sálarlig menning fyri meg, sigur høvuðsleikarin Jóannes Lamhauge, sum her verður hálsfevndur eftir seinastu sýning*

*Mynd: Finnur Justinussen*